Landssjúkrahúsið



# Soppaígerð

## Faldari til alla familjuna, tá mamma og/ella barn hava soppaígerð

**Innihaldsyvirlit:**


Candida albicans/gersoppur.................................................... 3

Tekin hjá mammuni................................................................ 3

Tekin hjá barninum. ................................................................ 4

Átøk ......................................................................................... 4

Praktisk átøk............................................................................ 4

Øll familjan.............................................................................. 4

Mamman ................................................................................. 4

Barnið........................................................................................ 5

Medisinsk viðgerð.................................................................... 6

Mamman ................................................................................. 6

Barnið........................................................................................ 6

## Candida albicans/gersoppur

Tann mest vanligi soppurin, sum øll menniskju hava í munni og í slímhinnum, er gersoppur, sum kallast Candida albicans. Hann veksur vanliga í javnvág saman við øðrum smáverum. Hesin javnvágur hevur stóran leiklut í immunverjuni hjá kroppinum sum vernd ímóti m.a. ígerðum (infektiónum). Tó kann koma fyri, at tað hendir ein ójavnvág,  so at soppurin økist ov nógv. Orsøkirnar kunnu vera fleiri eitt nú strongd orsakað av burði ella antibiotikaviðgerð.

Ymisk tekin kunnu benda á, at mamma og/ella barn hava sopp. Niðanfyristandandi tekin kunnu vísa seg, men onkuntíð kennast/síggjast bert **einstøk** tekin.



### Tekin hjá mammuni

- Sterk, brennandi/skriðjandi/svíðandi pína, sum strálar frá bróstvørtuni inn í bróstið
- Pínan kennist, bæði **meðan** barnið sýgur, og eisini tá barnið **ikki** sýgur
- Húðin á bróstinum (á vørtuni/á tí brúna økinum) kann síggjast skínandi ella roðslut (skællet) ella reydlig
- Sár/rivur á vørtuni sum ikki lekjast
- Hvít skorpa á vørtuni ella á tí brúna økinum rundan um vørtuna
- Soppur í neðra áðrenn burð, sum kann (hava) smittað

barnið

**Tekin hjá barninum**

- Hvít skorpa (belægninger) í munninum
- Óróligt meðan tað sýgur
- Reyð rumpa

## Átøk

Soppur kann smitta frá mammu til barn og øvugt. Tí er alneyðugt, at bæði mamma og barn fáa viðgerð samstundis.
Viðgerðin vil altíð umfata nøkur praktisk átøk, sum eru grundleggjandi fyri at basa smittuni, og fyribyrgja at soppur kemur aftur.



## Praktisk átøk:

**Øll familjan**

- BH, seingjarklæði, og handklæði skulu vaskast við 60°C
- Vaska væl hendur aftaná WC og blæuskift, og turka hendurnar væl
- Ikki koyra suttuna hjá barninum í munnin hjá nøkrum øðrum enn í munnin á barninum

**Mamman**

- Vaska bróstvørturnar varisliga við vatni við brúsi í (apollonaris/danskvatn) áðrenn og aftan á hvørja

bróstageving. Vatn við brúsi í hevur eitt súrt PH, sum darvar soppavøkstur

- Syrg fyri at vørturnar fáa luft og ljós – allarbest er við beinleiðis sól á bróstini í nakrar minuttir.
- Nýt bummullsBH
- Nýt nýtt bróstinnlegg so skjótt sum innleggi er blivið vátt
- Nýt ikki ullinnlegg tí tað kann ikki vaskast við 60°C
- Um mjólkimaskina verður nýtt, skulu allir lutir vaskast væl og kókast (10 min.) dagliga
- Avlasta mammuna
- Viðmælt er, at vera afturhaldin við søtum mati
- Et/drekk súrgaðar mjólkavørur og/ella mjólkasyrutablettir. Hetta styrkir bakteriufloruna aftan á antibiotikaviðgerð
- Nýt hít við samlegu



## Barnið

- Hvít skorpa í munninum á barninum, verður tikin burtur við einum vátum gazeklúti á einum fingri. Vatn við brúsi í kann  verða nýtt.
- Um barnið nýtir suttu ella fær fløsku, skulu allir lutir kókast í 10 min. dagliga. Vit vilja mæla tær til at beina burtur tær gomlu sutturnar og fløsku sutturnar, tá ígerðin er liðug
- Í flestu førum er tað nokk við nevndu átøkum fyri at basa soppaígerðini.

fyri at basa soppaígerðini.
Í øðrum førum er hetta ikki nokk, og tá kann verða neyðugt við medisinskari viðgerð.

# Medisinsk viðgerð

## Mamman

Brentan munnhulegel 20 mg/g

- Verður smurt á vørturnar í mesta lagið 8 ferðir dagliga

## Barnið

Brentan munnhulegel 20 mg/g

- Reinsa fyrst munnin á barninum við vatni við brúsi í. Smyr síðani Brentan munnhulegel í munnin á innaru síðurnar á kjálkunum, á tunguni og á tanngarðinum. Nýt ein fingur ella gazeklút til hetta
- Skal smyrjast min. 4 ferðir dagliga – helst aftan á at barnið hevur sogið
- Um barnið hevur reyða rumpu, skal Brentan munnhulegel eisini smyrjast á 4 ferðir dagliga. Umráðandi er at rumpan verður luftturkað, áðrenn blæan verður koyrd á aftur
- Viðgerðin heldur fram, so leingi mamman er í viðgerð

Viðgerðin skal halda fram 1 til 2 vikur aftaná at tekin til soppaígerðina eru horvin. Um tekini ikki hvørva, sjálvt um tey nevndu átøkini og medisinska viðgerðin eru framd, far so til tín kommunulækna til nærri útgreining.

Landssjúkrahúsið

www.ls.fo